1a

# Avleiðingar, um M/F Smyril ikki yvirheldur ætlaðu dokking í oktober 2008.

Fyrst má sigast, at tað harmar okkum, at fíggjarnevndin tók hesa støðu, tí sum áður fráboðað, er hetta nakað sum ikki kann avgreiðast í eini handavending, men krevur eina góða og gjóðliga tilrættisleggjan. Eisini harmar tað okkum at hoyra slík útalilsi og niðurgerðan frá fíggjarnevndarlimi, sum útalaði seg vegna minnilutan í Útvarp Føroya eftir viðgerðini av hesi okkara umsókn.

NB! Sum víst verður á niðanfyri, kann henda avgerðin blíva sera álvarsom fyri Smyril, og annars fyri alt samband við Suðuroynna. Eisini kan hendan útsetan blíva sera kostnaðarmikil fyri Landskassan, so okkara vón er, at fíggjarnevndin tekur hettar fyri okkum sera týdningarmikla mál upp til nýggja viðgerð sum skjótast.

Skipið, sum varð funnið at avloysa Smyril undir dokkingini, er tað fyrsta vit mugu siga frá okkum.
Tað kann vera sera trupult yvirhøvur at finna egnað skip til at røkja Suðuroyarleiðina.
Enn truplari og dýrari er tað, tá tað, sum í hesum førinum, bert er talan um góðar 14 dagar.
Um vit yvirhøvur fáa sama ella annað skip í ár, er tí óvist.

Dokkin í Fredericia verður somuleiðis avlýst.
Eftir drúgvar samráðingar, eydnaðist tað okkum at fáa dokkina í 14 dagar í oktobur, enntá til ein sera góðan prís, sum samanborið við líknandi verftir var um eina helvt.
Byggivirksemið á skipasmiðjunum runt um í Evropa er sera stórt, og tí er ikki óhugsandi, at verður farið at leita av nýggjum eftir eini tíð til dokking, kann bíðitíðin blíva long.

At lata Smyril fara undir enn ein vetur við finninum í tí standi tær eru nú, vilja vit ikki ráða til.
Tekin eru um, at slitið í finninum er so stórt, at um illa vil til, fáa vit ikki lagt finnurnar inn í skipið aftur eftir ein túr.
Hetta hevur so við sær, at skipið ikki sleppur at kaj.

Sum er nú, vilja vit ikki mæla til, at skipið siglir við finninum úti, um vindmegin fer upp um 20 m/s. NB!
Um bóltar á tetningsflansanum aftur byrja at fara, er vandi fyri, at vit fáa sjógv inn í hydrauliksystemið, og harvið eina óneyðuga stóra umvæling av finninum.
Frá februar til hálvan apríl 2008 bleiv brúkt yvir ein millión til kavara arbeiði á finninum á Smyrli.
Hetta, bert fyri at halda skipinum í vanligari sigling.
Vit vilja mæla til, at Smyril kemur í dokk sum skjótast, og í seinasta lagi áðrenn veturin setur inn.
Hetta so, at trupuleikin við finninum sum skjótast verður loystur, og soleiðis at ikki óneyðugur peningur og tíð verður brúktur uppá fyribilsloysnir.

Vinarliga.

Strandfaraskip Landsins
Dánjal Andreasen
Stjóri